Leikrit

# Tá ið jólamaðurin kom ov tíðliga



Landsmiðstøðin

# Tá ið jólamaðurin kom ov tíðliga

## Leikarar:

Abbin
Børnini 1-10
Jólamaðurin

| | |
|---|---|
| Vanlig skrift: | replikkir |
| *Skráskrift:* | *rørslur og umstøður á pallinum* |

*Á pallinum eitt pyntað jólatræ. Mitt á pallinum ein gamal stólur. Abbin kemur inn og setir seg – suffar.*

Abbin: Áje, áje, so kom tað so langt. Í morgin er jólaaftan, og alt er til reiðar. Jólatræið er pyntað, gávurnar eru pakkaðar og krógvaðar burtur til í morgin . . . . og øll abbabørnini, sum eru komin at vitja meg um jólini, hava endiliga lagt seg at sova. Nú kann eg endiliga hvíla meg og míni troyttu bein í friði og náðum.

*Børnini 1 og 2 koma inn fra vinstru.*

Barn 1: Abbi, eg sovni ikki.

Barn 2: Vit eru so spent til jólaaftan.

Abbin: Nei, vælsignaði . . . . . nú mugu tit leggja tykkum aftur og . . . .

*Børnini 3, 4 og 5 koma inn fra høgru.*

Abbin: . . . . og vera liggjandi til í morgin . . . . (sær 3, 4 og 5) . . . . Minnist til! Tit lovaðu øll somul, tit lovaðu mær . . . . .

*Børnini 6, 7 og 8 koma inn fra vinstru.*

Abbin: . . . at, at . . . .

*Børnini 9 og 10 koma inn fra høgru.*

Abbin: . . . . at tit skuldu leggja tykkum at sova, tá eg hevði sagt tykkum

ta seinastu søguna.

Barn 3: Jú, men vit hildu, at vit fóru at vilja sova tá!

Barn 4: Men tað vildu vit ikki kortini.

Barn 6: Vit eru so øgiliga spent eftir at vita, hvat vit fáa í jólagávu.

Barn 7: Og vit fáa ikki sovið, tá ið vit alla tíðina liggja og hugsa um, hvussu dagurin í morgin verður.

Barn 8: Og eg vil sleppa at vera uppi, tá ið jólamaðurin kemur við gávunum.

Abbin: Síggja jólamannin? Í kvøld? Nei, tað ber ikki til, tí hann vísir seg ikki fyri børnunum, tá hann kemur við jólagávunum. Hann kemur slett ikki inn, fyrr enn tit eru sovnaði. So . . . sova tit ikki, so kemur hann als ikki.

Barn 5: Men abbi, kanst tú so ikki siga okkum eina søgu aftrat. So sovna vit kanska betur.

Abbin: Harrans malargrót og flag! Eina søgu aftrat!!? Eg havi sagt tykkum allar søgurnar, ið eg minnist. Og tit lovaðu mær, at tit skuldu leggja tykkum, tá eg hevði sagt ta seinastu.

Barn 10: Jú, men vit skulu leggja okkum beinanvegin, um tú sigur okkum bara **eina** søgu aftrat.

Barn 5: Ja, abbi! Góði! Bara eina!

Abbin: Eina søgu aftrat? Jamen . . . jamen . . . . jamen . . . . !?

Øll børnini: Áááájúúúú abbi! Bara eina!!!

Abbin: Men, men . . . . . Ja, so skulu tit lova mær, at tit leggja tykkum beint at sova so skjótt, sum eg eri liðugur at siga frá!

*Hyggur strangliga kring seg at teimum øllum.*

Abbin: Lova tit tað??

Øll børnini: Jaaaa, tað lova vit!!!!

Abbin: Púra vist???

Øll børnini: Ja, púra vist!!

Abbin: Ja. . . . alt í lagi, meðni. Men so skulu tit eisini leggja tykkum umgangandi aftaná!

Øll børnini: Ja, tað skulu vit!

Abbin: Ja, ja. Setið tykkum so her uttan um meg, so skal eg siga tykkum søguna um hina ferðina, tá ið jólamaðurin fór skeivur av døgunum. Síggja tit, nú er tað soleiðis, at . . . . . (hann sigur alla søguna um, tá ið jólamaðurin kom ov tíðliga, tí at krákan stjól nakrar síður úr almanakkanum hjá honum) . . . . . so tað

árið hevði jólamaðurin góða tíð at hvíla seg í desembermánaði, so at ongantíð fyrr var hann so væl fyri at fara at bera gávurnar út, tá ið jólini at enda veruliga vóru í hondum. Snipp, snapp, snúti – nú er søgan úti — og nú fara tit øll í song!!!

Barn 10: Kunnu vit ikki bíða eitt lítið sindur aftrat?

Barn 9: Ja, bara eina lítla løtu?

Barn 8: Ja, abbi, góði sig okkum eina søgu aftrat!

Abbin: Men, tit lovaðu . . . . .

Barn 7: Eg tími ikki í song enn!

Barn 6: Heldur ikki eg!

Barn 5: Eg vil sleppa at vera uppi, tá ið jólamaðurin kemur.

Barn 4: Eisini eg.

Abbin: Jamen, jólamaðurin vísir seg ikki fyri børnunum í kvøld! Hann stendur uttanfyri og bíðar, til øll hava lagt seg! Og soleiðis sum tit skikka tykkum í kvøld, verður hann stívur av kulda uttanfyri, áðrenn hann nakrantíð kemur inn.

Barn 3: Nei, abbi, nú pellar tú bara fyri okkum fyri at fáa okkum í song.

Barn 2: Ja, abbi, tú ert so herviligur til at finna upp á.

Barn 1: Ja, tað er tí, tú kanst siga so nógvar søgur. Tú minnist tær ikki frá fyrr. Tú finnur upp á tær!

Abbin: Eg?! Nei, álvaratos . . . .

Øll børnini: *(Dansa kring abban og syngja)* Abbi pellar! Abbi pellar! Abbi pellar!

*Meðan hetta fer fram, kemur jólamaðurin inn og sær skilið. Hann steðgar á og setur hendur í hupp.*

Jólamaðurin: (Strangliga) Nú, nú, nú góðu børn!!! (Børnini bráðtagna og venda sær ovfarin ímóti jólamanninum). Ikki fara so illa við abba tykkara. Tað er púra rætt, sum hann sigur. Eg eri næstan stirdur, so leingi sum eg havi staðið og bíðað eftir, at tit skuldu fara í song og leggja tykkum, sum onnur góð og fitt børn langt síðani hava gjørt.

Barn 1: Vit skulu fara at leggja okkum beinanvegin.

Barn 2: Vit vistu ikki, at tú stóð uttanfyri og bíðaði.

Jólamaðurin: Tað fáa vit at síggja. Nú fari eg fyrst í nøkur onnur hús, har børnini liggja fitt og sova. Og so komi eg aftur um eina løtu, og um tit tá eru sovnaði, so skulu tit eisini fáa.

Øll børnini: Túsund takk fyri!

Jólamaðurin: Aktið so abba tykkara og farið øll og leggið tykkum!

Barn 10: Ja, men kunnu vit sleppa at syngja ein sang fyri tær fyrst.

Jólamaðurin: Jú, tað er í lagi.

*Orkestrið kemur inn, tónleikurin byrjar. Børnini og jólamaðurin syngja "Koyr okkurt í mína hosu". Tá sangurin er liðugur, fer orkestrið út.*

Øll børnini: Góða nátt, abbi! Góða nátt, jólamaðurin!

*Tey fara øll út.*

Jólamaðurin: So fari eg at ynskja tygum eini gleðilig jól, aðrenn eg fari longur.

Abbin: Ja, gleðilig jól somuleiðis, og takk fyri hjálpina.

Jólamaðurin: Hugsið ikki um tað. Góða nátt.

*Jólamaðurin fer.*

Abbin: Góða nátt! (Setur seg). Ógemeina fitt fólk – hasin jólamaðurin!

*Liðugt.*